

# Hvussu væl kennir tú Bíbliuna?

## Jólakapping fyri børn upp til 17 ár

Nú jólini standa fyri durum, fara vit á Sosialinum undir eina kapping við spurningum til børn og ung upp til 17 ár um mangt og hvat í Gamla og Nýggja Testamenti.

Vit byrja í dag hósdag 4. desember við sjey spurningum. Teir skulu øll tit, ið vilja vera við í kappingini, klippa út, svara, skriva navn, bústað, tel. og aldur á, og goyma. Tað sama skulu tit gera við spurningarnar, vit hava til tykkara í hvørjum Sosiali til og við mikudag 17. desember, tá kappingin endar.

Allir spurningarnir í kappingini eru ikki líka lættir at svara. Tá kunnu tit til dømis fara í bíbliusøgurnar, tit lesa ella hava lisið í skúlanum at finna svarini. Ella hví ikki spyrja tey tilkomnu í húsinum! Í telduni ber eisini til at leita eftir svarum.

Leparnar, tit hava klipt út og goymt *(við spurningum, svarum, navnið, bústaði, tel. og aldri)* skulu tit senda Sosialinum í seinasta lagi leygardagin 20. desember. Í brævbjálvanum til okkara skal sama navn standa á øllum lepum. Uttaná skal standa "Jólakapping 2003", navn á luttakara og bústaður. Tit, ið tá hava sent allar lepar inn og svarað rætt, verða við í lutakasti um fýra virðislønir.

Við vón um undirtøku frá hópin av børnum og ungum um alt Føroya land, ynskja vit øllum ein góðan jólamánað.

HESTPRENT · TEL. 314 555

VINNINGAR:

**1. Vinningur:**

**Vikuskiftisferð fyri tvey til Íslands**

ATLANTIC AIRWAYS



Blue Lagoon




## Hvussu væl kennir tú bíbliuna?

*Spurningar úr Gamla testamenti*

| Spurningar | Tykkara svar |
|---|---|
| **29** Ísraelskongur og Batseba fingu ein son, sum gjørdist kongur eftir pápa sín. Mest kendur er hann fyri sín vísdóm og fyri templið, hann læt byggja í Jerusalem. Hvussu æt hann? | : |
| **30** Í Gamla Testamenti eru nógvir profetar. Ein tann kendasti er Elia. Ein fátæk einkja, ið hann einaferð gisti hjá, fekk tað lyftið frá honum, at mjøl hennara í krukkuni skuldi ikki verða uppi og oljan í krússinum ikki tróta, til regn kom aftur. Hvussu æt staðið, har einkjan búði? | : |
| **31** Á einum heilagum fjalli skuldi Elia profetur einaferð prógva, at Harrin og ikki avgudurin Báal var tann sanni Gud. Hvussu æt fjallið? | : |
| **32** Gud sendi ein av profetum sínum til Ninive at boða frá, at býurin fór at verða lagdur í oyði, tí fólkið var so gudleyst. Í staðin fyri at fara beinanvegin, rýmdi profeturin umborð eitt skip, har hann í ódnarveðri varð tveittur fyri borð. Hvussu æt profeturin? | : |
| **33** Fýra av profetunum við bókum í Gamla Testamenti verða kallaðir teir stóru profetarnir, tólv verða kallaðir teir smáu. Tann fyrsti av teimum stóru eitur Esajas. Hvussu eitur tann næsti? | : |
| **34** Eftir at vísasti kongurin hjá Ísraelsmonnum var deyður, fór ríkið í tvey. Størri parturin kallaðist Júda ríki. Fólkini har vórðu seinni flutt burtur í annað land, har tey noyddust at støðast í 70 ár. Hvussu kallaðist tað landið? | : |
| **35** Nebukadnezar æt kongurin, sum flutti fólkini í Júda ríki í útlegd í sínum ríki. Á eini veitslu, sonur hansara helt, skrivaði ein hond á veggin: Mene tekel ufarsin. Orðini merktu, at dagar hansara vórðu taldir, og at hann fór at missa ríkið. Hvør var kongurin, sum tók ríkið og lovaði jødum heimaftur? | : |

*Navn á luttakara:* *Bústaður:*

*Telefon:* *Aldur:*

At klippa út og goyma, til kappingin endar 20. desember. Seinasta freist at senda Sosialin allar útkliptu leparnar við spurningum og svarum, navni á luttakara, bústaði, tel. og aldri, er leygardagin 20. desember. Uttan á brævbjálvanum skal standa Jólakapping 2003, umframt navn á luttakara og bústaður. Minnist til, at allir lepar í brævbjálvanum frá hvørjum einstøkum luttakara, skulu hava sama navn.

Sosialurin
Postboks 76
FO-110 Tórshavn
Tel. 341 800 • Fax 341 801



**VIÐMERKINGAR**

# Febrilskir feðgar fjøtraðu føroyskar fjølmiðlar

**Virgar T. Dalsgaard**

Síðani løgmaður í 1998 kallaði saman alt tað føroyska tíðindamannaliðið frá bløðum, út- og sjónvarpi og legði teimum eina við, hvussu fullveldið skuldi fremjast, og næstan appelleraði til minst møguliga debatt og helst ikki ov nógvar forvitnar spurningar, ja, so hevur kritiskur journalistikkur í Føroyum næstan ikki verið til! Hetta var ein ódámligur og manipulerandi fundur, sum ikki sømdi seg fyri ein borgarligan flokk, men flestøll mundu gruna, at tað var heldur ikki tann borgarligi Fólkaflokkurin, sum hevði funnið upp á at vilja stýra fjølmiðlunum ella næstan múlabinda alt journalistaliðið á »sjálvboðnan hátt«! Metodan við at stýra fjølmiðlunum er ikki ókend fyri eldra feðgan Hoydal og er ofta umrødd av framamonnum, sum regluliga fýltust á føroyskan tíðindaflutning. So vit mugu meta, at løgmaður her helst, sum ikki eina ferð, hevur verið óbeinleiðis stýrdur úr London og eitt hent amboð hjá feðgunum.

Sum boðberi feðganna at kalla kravdi løgmaður, at journalistarnir skuldu góðkenna landsstýrisins hjálparleysa evangelium um fullveldi – hann visti væl, at allur tann nationalistiski boðskapurin var so últsaligur og viðbrekin, at hann toldi ikki debatt ella hvast orðaskifti, og tí forvæntaði landsstýrið, at fjølmiðlaliðið skuldi akta landsgonguna í øllum hennara tvangstankum. Og síðani tá hava landsstýrismenn stórt sæð verið friðaðir í fullveldismálum.

Tað tykist sum um tíðindafabrikantarnir hava verið programmeraðir til at hjálpa landsgonguni við at fremja fullveldisskipanina, sjálvt um fólk vóru skeptisk og flestøll ímóti. Hetta er ein óhugnalig støða, sum minnir um bæði katolicismu og kommunismu. Alt skal trúttast ígjøgnum úr erva, ella ex catheara, sum tikið verður til. Í slíkum system-kompleksum er ikki pláss fyri atfinning. Boðskapurin er so mikið naivur og veikur, at hann vil ikki kunna greiða eina kritiska debatt. Tí má alt baserast upp á postulerandi dogmir, og kritisk debatt ella hvast orðaskifti verður bannlýst! Fullveldismálið er so mikið spinkult og illa undirbygt, at tað tolir ikki at verða toygt úr hvørjari lykkju – tað má og skal lumpast ígjøgnum. Hetta hevur altíð verið achilleushælurin hjá loysingarrørsluni.

Hon orkar ikki og tolir ikki kritiska debatt.

Ein av hesum tíðindamonnum var placeraður á sjálvari Dimmalætting, hesum heiðurskrýnda gamla sambandsblað. Hann skuldi vera tíðindamaður, altso referentur og ikki kommentator! Tað fall nógvum eldri sambands- og javnaðarfólki fyri brótstið at lesa skammrósandi greinir um øll tey meira og minni vitleysu uppskot, sum komu úr Tinganesi. Hann vælsignaði kritikkleyst, gloypti skikkiliga og svølgdi uttan at blunka hvørjum postuláti, sum kom frá Høgna Hoydal, óansæð hvussu tápuligt tað var.

Hóast greinir hansara ofta stóðu á forsíðu Dimmalættingar, har vanliga bert refererandi tilfar stendur, so vóru tær soleiðis skrivaðar, at tann gløggi lesarin ikki helt hetta vera vanligan tíðindaflutning, men heldur eina politiska framløgu, har maðurin kommenteraði heldur enn refereraði. Tað hevur hann sjálvandi skrivifrælsi til, men tá er hann ikki blaðsins maður longur, og má so skriva *persónliga fyri heilt egna rokning* á debattsíðunum.

Ingi Rasmussen var við at gera ta áður seriøsu Dimmalætting til grin sum tíðindablað! Ein pendant til henda Inga hevði Sosialurin fingið at dragast við – hann æt Høgni Mohr, og skrivaði so forliptar, so frelstar og so púra kritikkleysar fullveldisgreinir um Høgna Hoydal á sjálvari forsíðu javnaðarblaðsins, at javnaðarveljarar øtaðust og vamlaðust. Hesin tjóðveldis-agenturin, Høgni Mohr, slapp seinni inn á Dimmalætting. Klagurnar til báðar blaðstjórarnar um hesar menn vóru endaleysar, og tíbetur sluppu bæði bløðini av við teir … MEN um ikki harra Ingi Rasmussen kom fram aftur á Sosialinum, eftir at Dimmalætting endiliga var sloppin av við hann! Tá ið Dimmalætting slapp av við Høgna Mohr, loftaði *Fregnartænasta* Tjóðveldisfloksins honum, og vælgagnist teimum!

Ta fyrstu tíðina Ingi skrivaði á Sosialinum, skikkaði hann sær og skrivaði, sum hann eigur um neutralar hendingar, og fáur gav sær far um annað.

### Substansur ella garnitura

Men so um miðjan oktober í ár tevjaði Ingi aftur kristnamannablóð. Javnaðarkvinnan Katrin Dahl Jacobsen hevði á tingi loyvt sær at fýlst á grova populistiska atburð varaløgmans upp undir seinasta fólkatingsval, har hann, avgjørt *uttan nakað vissugrundarlag* lovaði fólki olju. Samstundis loyvdi Katrin Dahl Jacobsen sær at samanbera varaløgmansins demagogisku framferð fyri at bjarga sær stemmur í allar evstu løtu við ta propagandu, sum hevði verið vanlig í totaliterum londum! Hon nevndi ongan fascist, kommunist ella nazist við navni!

Hevði nú Ingi verið at sær komin tíðindamaður, so hevði hann borað í sjálvum substansinum, nevniliga tí veruleika, at Katrin Dahl Jacobsen týðuliga vísti á, at Høgni Hoydal grovt yvirspældi sína rollu við *uttan fulla vissu* at royna at billa fólki inn, at nú var vælferðin tryggjað – *oljan var funnin*! Men hvat ger Ingi – hann heftir seg *ikki* við innihaldið í málinum, – hann heftir seg við formin! Hann roynir við í sínum greinum at fáa Adolf Hitler í staðin fyri Hoydal blandaðan upp í føroyska oljuvinnu. Í sínum polemiska formi, men avgjørt sakliga innihaldi, hevur Katrin Dahl Jacobsen yvirhøvur ikki nevnt Adolf Hitler, men tann má vera sekur, ið at sær tekur.

Í staðin fyri at vera professionelt errin av, at eitt javnaðarfólk á tingi torir at skræða gekkaskortin av einum manipulerandi og populistiskum landsstýrismanni, so fer Ingi Rasmussen ómansliga eftir einum djørvum konufólki, sum ger ein part av tí arbeiði, hann sjálvur átti at gjørt. Hjá hesum journalisti verður garnituran í røðuni prioriterað hægri enn substansurin!

*Hvussu* Katrin Dahl Jacobsen greiddi frá varaløgmansins grovu demagogi var fyri harra Inga Rasmussen meira avgerandi at festa seg við, enn *hvat* hon segði, og tað fellir ikki Inga inn at bora í tí faktum, at landsstýrismaðurin royndi at lumpa føroysku veljarafjøldina beint upp undir valið og harvið allarhelst »stjala« fólkatingsmandatið frá antin Javnaðar- ella Fólkaflokkinum!

### Forvitnisligur og hektiskur mánadagur

Tað stutta av tí langa í hesum máli er tað, at teir ovurnervøsu feðgarnir Hoydal í tólvta tíma áðrenn fólkatingsvalið, royndu eitt ónossligt kvett fyri at tryggja yngra feðga fólkatingsmandatið. Til dømis átti harra Ingi at sett kritiska ljóskastaran á, hvat ið hendi bæði í landsstýri og í fjølmiðlum mánadagin fyri valið, og hví eldri feðgi var staddur júst hetta vikuskiftið í Føroyum í staðin fyri at passa sítt arbeiði (sic) í London. Og var Ingi nakar maður, átti hann at kanna, hví eldri feðgi sýndi so febriskan aktivitet í Havn hetta vikuskiftið fyri at fáa bæði fjølmiðlar, petroleumsministara og føroysku veljarafjøldina sannførda um, at NÚ var olja funnin og túsundársríkið beint fyri stavn!

Hví var til dømis okkara skikkiligi og skróturri oljuministari, hampamaðurin harra Eyðun Elttør lokkaður til at halda bombastiskan tíðindafund um olju klokkan 11.00 fyrrapart, dagin fyri valið, hóast Amerada Hess ikki hevði lovað nakað um, at tað sindrið, sum funnið var, kundi útvinnast ella skapa møguleika fyri nakrari framleiðslu. Tvørturímóti – Ameradamenn søgdu týðuliga, at hetta skuldi kannast nærri. Tað var eingin grund til, og avgjørt ikki nóg mikið av substansi í Ameradatíðindunum til at halda ein so propagandistiskan fund. Spurningurin er um menn í øðrum londum ikki høvdu verið lagdir undir at renna ørindi fyri parthavarar og gera seg skyldugan í kurspleygu av partabrøvum atlantisku petroleumsmanna. Nú hava vit onki virðisbrævamarknaeftirlit, so menn sluppu undan átalu í hesum føri.

Klokkan 12.30 sama mánadag lýsti útvarpið til veldugan fund á Hotell Føroyum klokkan 17.30, har seinni bæði sjónvarp og útvarp vóru til staðar og eldri feðgi sum nevndarformaður í Atlantic Petroleum lýsti framtíð partaeigaranna spesielt og føroyska fólksins generelt sum glæsiliga og næstan problemfría. Hetta var primitiv, grov og ósmaklig demagogi! Tað var, sum áður nevnt *einki í orðunum frá Amerada Hess,* sum gav nakað grundarlag fyri slíkari optimismu, hvørki hjá eldra feðga ella øðrum petroleumsmonnum. Hesin sonevndi kunningarfundur á Hotel Føroyum var altso meira og minni bluff!

Stjórin í petroleumsfelagnum, Vilhelm Petersen, fyrigykladi naivum føroyskum strembarum risastóran kursvinning við ljósareyðum orðalagi! Í Sosialinum leygardagin fyri verður annars týðuliga skrivað, at tað ikki kann sigast nakað um, at tað verða útlit fyri framleiðslu av olju, tað mugu nærri og gjøllari kanningar til! Har var eingin vissa, har vóru bara beskednar metingar, nógv fyrivarni og spinklar vónir!

Hesi fyrivarni tóku hvørki eldri ella yngri feðgi – nú kunnu fólk sjálv meta um, hvør ið lýgur! Hava feðgarnir ikki logið, so hava teir, ið hvussu so er ikki sagt allan og fulla sannleikan! Tað er grovt ábyrgdarloysi at fara út og siga hálvar sannleikar, serliga beint undan vali og geva veljarafólki varhugan av, at olja er funnin, tá ið fyrivarni verða tikin fyri, at tað er nakar reellur møguleiki fyri framleiðslu!

Tann, sum trýr, at Londonfeðgin ikki hevur nakra ábyrgd av, at Tinganesfeðgin fór út dagin eftir í bløðunum og reypaði av, at oljan var funnin, ja, hann hevur tað, sum tann, ið trýr bæði upp á storkin, jólamannin og Tjóðveldisflokkin í senn! Slíkum fólki er synd í! Einki, sum hesir menn gjørdu, var spontant, tað var planlagt og fyrireikað niður í minsta komma, eisini lýsingin í Dimmalætting. Hon var tilætlað og præfabrikerað!

# Tjóðveldið hvokkið!

**Jákup Olsen**
*Vágur*



Tað var ikki sørt undrunarsamt at síggja sendingina úr tinginum, tá ið tjoðveldið tók seg úr samgonguni og ikki minni hugstoytt at vita, at tað skuldi vera tjóðveldisflokkurin, ið reistist frá borðinum, har ein mongd av yvirtøkumálum lógu, mettir og væl settir og takkaðu fyri seg. Teir høvdu jú fingið ríkiligt av sjálvstýrismálum framd, teimum nýtist ikki at yvirtaka fleiri á hesum sinni. Teir hava góða tíð, at støðga eini 40-50 ár, til næsta sjálvstýrissamgongan verður skipað. Tað eru 40 ár síðani, vit seinast høvdu eitt sjálvstýrislandsstýri, sum hvat yvirtøkumálum viðvíkir, ikki røkkur hesum landsstýrinum til kníggja, so tað er væl skiljandi, at tjóðveldi nú helt, at ríkiligt er yvirtikið í hesum umfarinum, og tí tóku teir seg úr samgonguni, so tað gongur rúm tíð, til Tjóðveldið aftur nevnir orðið yvirtøkur. Tað verður so í øllum førum ikki í hesari valorrustuni, sum nú stendur fyri durum. Flottur loysingarflokkur er? Teir kláraðu ikki loysing frá Danmørkini, men kláraðu loysing frá Fólkaflokkinum. Tað var kanska nóg mikið fyri teir. Tjóðveldið veit, at teir ikki mugu yvirtaka ov nógv, tí hvat skulu teir so liva av. Teir vilja onga loysing hava, og tað ber hesin sjónleikurin boð um hendan vanlukkudagin í tinginum.

Hvat hevur so Tjóðveldið eftir at fara til val uppá, tá ið teir ikki skulu tosa um yvirtøkur, tí ikki eru teir nakað vinarligir yvirfyri vinnuni? Eftir er so bert hjá teimum at tosa um vinstra politikk. Vit mugu bert til seinast siga, at vit skulu nokk eygleiða, hvussu leikur fer fram hjá teimum á uttasta vinstra í føroyskum politikki, men tað er jú teirra tráan eftir at sleppa at vera har.

## Rættleiðing til Virgar T. Dalsgaard

Sosialurin skal gera vart við, at tað var ikki okkara blaðmaður, Ingi Rasmussen, sum skapti málið, har tingkvinnan Katrin Dahl Jakobsen varð viðgjørd fyri sín málburð í løgtinginum. Høgni Hoydal, táverandi landsstýrismaður, reisti málið sum eina kæru til formansskapin, og blaðmaðurin tók síðan málið upp til viðgerðar. Seinni hevur formansskapurin eisini átalað málburðin hjá Katrin Dahl Jakobsen.

**blstj.**